# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Marna Olsen í Vági 65 ár

Tórsdagin 1.dec. verður Marna Olsen fyrrv. lærari í Vági 65 ár.

Góða mamma, vit fara hervið at ynskja tær hjartaliga til lukku við teimum 65 árunum.

Vit fara eisini her at siga tær takk fyri alt tað, tú hevur verið og er fyri okkum.

Vit systkin vuksu upp í einum góðum heimi, har tú lærdu okkum tey fyrstu orðini, vit søgdu, har tú lærdi okkum móðurmálið, og har tú styðjaði okkum tey fyrstu fetini vit tóku. " Málid mítt kæra fyrst lærdi tú meg fetini, fyrstu á stetlanarveg, takk sigi eg". Eisini siga vit tær takk fyri, at tað var til tín, vit komu sum óvitar fyri at stilla okkara trá, tá ið á leikaði. Vit vita, at tú hevur verið ein sera góð mamma, so tað verður tungt at treða í tínum fótasporum. Takk fyri allar søgurnar, tú las fyri okkum sum børn, áðrenn vit sovnaðu og takk til Hansara, sum fyri okkum hevur fingið so nógv í lag, tí tú í tínum bønum Hann um hetta bað. Góða mamma, vit siga tær takk fyri alt tað góða, tú hevur lagt í okkum og sum heldur okkum á rætta vegnum, allastaðni, har íð kann traðast av monnum.

Nakað, sum vit systkin eru sera glað fyri, nú vit øll trý búgva í Havn er, at tú kanst vera so nógv her hjá okkum. Hetta eru ikki minst ommubørnini sera glað fyri.

Mamma, røsk hevur tú altíð verið ,skilagód, pertentlig, álítandi og dugnalig og sum lærari við Vágs skúla alla tína lærаratíð manst tú teljast millum teir allarbestu. Tað var eingin, sum kundi taka nakað úr tínum hondum. Eisini sum lærugreinaráðgevi í donskum fyri alt landið royndist tú holl. Álitið á teg var stórt. so m.a. rættaði tú danskar stílar hjá 10.fl. úr øllum Føroyum alt tað, vit minnast. Friðarlig og stillfør hevur tú altíð verið, og eftir loknan arbeidsdag í skúlanum hevur tú passað



heimið, tó skulu vit ikki gloyma teg sum formann og ein av stovnarunum av Barnabata.

Tú og pabba komu heim til Vágs eftir lokna útbúgving í Danmark og gjørdist m.a. slóðbrótarar innan skúlaøkið, so ikki kann sigast annað enn, at tað, tit hava lagt úr hondum, er valaverk. Vid Vágs skúla vart tú pabba ein góður stuðul og eftir tykkum stendur Vágs skúli vid 25 m. svimjihyli sum eitt prýðuligt minni, so ikki gróvu tit talentirnar niður, men røkti tað, sum tykkum var litið upp í hendi við miklum sóma og nærlagni. Eisini skal nevnast, at pabba var við til at fáa H.F. til Vágs, og óvist hevði verið, um studentaskúlin var fluttur úr Vági, um hann enn sat sum skúlastjóri. Jú,sanniliga bóru tit bæði tæguna enn longur fram á vegin.

Mamma er dóttur Elsu og Alfred Holm úr Vági. Elsa omman fødd Larsen av Oyrabakka, har mamma hennara Magnina kom úr Biritustovu á Eiði, og pápin Óli kom úr Búrstovu eisini á Eiði. Alfred Holm var úr Vági sonur Sigrid og Julius Joensen. Sigrid ættað úr Fuglafirði og Julius ættaður úr Vági.

Góða mamma vit gleða okkum til at halda føðingardagin saman við tær tann 10, tá ið tað passar okkum øllum at vera saman.

Hjartaliga til lukku við degnum.

**Elsa Maria, Martin Karl og Annika**

## Andlát og jarðarferðir

**Karl Thorleif Olsen**, Tórshavn, andaðist í heiminum mánadagin 29.november, 81 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Hanna Klein** frá Gjógv andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi týsdagin 29. november, 86 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Hannu á Rætt, kunnu lata Gjáar kirkju eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Martina Jensen**, fødd Andreasen, ættað úr Havn, búsitandi í Løjtkirkeby í Suðurjyllandi, andaðist fríggjadagin 25. nov. 53 ára gomul. Jarðarferðin verður úr kirkjuni í Løjtkirkeby mikudagin 30. nov. kl. 14.

**Gardar Høgnesen**, Klaksvík, andaðist í heiminum mánamorgunin 28. november, 46 ára gamal. Kistan fer av kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13:30. Tey, ið vilja minnast Gardar kunnu lata Emmaus eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

**Elly Bláhamar,** Vestmanna, andaðist sunnukvøldið 27. november, 65 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum í mikudagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæri maður, pápi, abbi og verpápi

**Thomas Pauli Jacobsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri kransar, blómur og heilsanir.
Takk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu
til við jarðarferðina.
Tøkk til heimahjálp og heimasjúkrasystrar, sum
hjálptu so væl meðan Tummas var sjúkur.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Sigbjørg**

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða
kona, mamma, vermamma og omma

**Elly J. Bláhamar**
Vestmanna

andaðist sunnukvøldið 27. november, 65 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum mikudagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju
hósdagin kl. 13.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Fyri tey avvarðandi*

**Anfinn, Anna Maria og Fríðálvur**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið elskaði
maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Peter Christian Johannesen**
Vanliga nevndur Peter hjá Fritleif
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri umsorgan á G4.
Takk til prest og sangarar.
Takk fyri hjálpsemi til ervið.
Hjartans takk til tykkum øll, ið fylgdu honum til
hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Anna, Brynja, Gulbrit og Finnbogi**

---

Okkara elskaði sonur og bróður

**Gardar Høgnesen**

Klaksvík

andaðist mánamornunin 28. nov. í heiminum.

Bønarhald verður í kapellinum á Klaksvíkar
sjúkrahúsi mikukvøldið 30. nov. kl. 18.
Jarðarferðin verður hódagin 1. des. kl. 13.30
úr Christianskirkjuni.

**Sybilla, Hjalmar, Turið, Gunhild,
Jóan Magnus og Eyðun**

*Tey, ið vilja minnast Gardar kunnu lata »Emmaus« eina peningagávu.
Konto í Norðoya Sparikassa*





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Ført tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo